Fy LM-085/2023

ÚTLENDINGASTOVAN
IMMIGRATION OFFICE

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J. H. Schrøtersgøta 7
FO-100 Tórshavn

Hoyringarsvar um uppskot til løgtingslóg um málskúla fyri føroyskt sum annaðmál

31. oktober 2023
Mál: 203-0018/23-8
Ref:
Viðgjørt: KRE

Útlendingastovan takkar fyri, at uppskot til løgtingslóg um málskúla fyri føroyskt sum annaðmál er sent Útlendingastovuni til hoyringar, og vil við hesum hoyringarsvari gera viðmerkingar til lógaruppskotið.

Útlendingastovan fegnast um, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið við hesum lógaruppskoti átekur sær at skipa ein løgfrøðiligan karm fyri undirvísing í føroyskum máli, mentan og samfelagviðurskiftum fyri borgarum í Føroyum, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál. Útlendingastovan metir tað vera av størsta týdningi, at landið átekur sær samskipandi ábyrgd av, at borgarar, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál, kunnu nema útbúgving í føroyskum sum annaðmál kring alt landið, umframt at tryggja góðsku og einvorðni í undirvísingartilboðnum í øllum økjum í landinum.

Útlendingastovan hevur harafturat nakrar ítøkiligar viðmerkingar og spurningar.

Persónsbólkur og raðfesting
Útlendingastovan metir, at tað ikki er greitt, hvørji eru fevnd av løgtingslógini. Skilabest mann vera at áseta hetta nærri, um ynski er um at kunna avmarka, hvørji og hvussu nógv skulu fáa ókeypis undirvísing.

Útlendingastovan skal í hesum sambandi viðmerkja, at tað eru politiskar ætlanir um í kunngerð at áseta eina máltreyt í málum um varandi uppihaldsloyvi. Við tíðini kann tað gerast viðkomandi eisini at áseta eina slíka máltreyt í málum um at veita ríkisborgararætt við fólkatingslóg. Til tess at kunna áseta eina slíka máltreyt er tað hóskandi, at allir útlendingar hava møguleika at fáa undirvísing í føroyskum og standa prógvtøku, sum lýkur hesar máltreytir. Tó er viðkomandi at áseta nærri reglur um at geva ávísum útlendingum forrætt at sleppa framat

undirvísing og prógvtøku, t.d. útlendingar við uppihaldsloyvi eftir reglunum um familjusameining, friðskjól, uppihaldsloyvi av heilt serligum ella menniskjaligum ávum og eftir serlógini um persónar, ið eru riknir burtur úr Ukraina. Um luttøka í undirvísing í føroyskum er treyt fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi, uppihaldsveiting ella útgjald úr Arbeiðsloysisskipanini er neyðugt, at málskúlin tryggjar, at persónurin skjótast gjørligt sleppur framat undirvísing á hóskandi støði. Møguleiki eigur eisini at vera at niðurraðfesta undirvísing í føroyskum til útlendingar, ið longu hava nomið sær eina útbúgving ella staðið eina prógvtøku í føroyskum á einum stigi, ið gevur viðkomandi atgongd til at fáa varandi uppihaldsloyvi, ríkisborgararætt umframt atgongd til at nema sær útbúgving í føroysku útbúgvingarskipanini.

Fyrimynd
Sum skilst er ætlanin at skipa málskúlan eftir sama leisti, sum Musikkskúlaskipanin. Útlendingastovan metir tó, at tað ikki er nóg greitt, hvussu henda skipan skal tryggja hóskandi undirvísingartilboð í øllum økjum í landinum, um kommunurnar og kommunalu kvøldskúlarnir ikki ynskja at reka ein kommunalan málskúla. Hvussu verður gjørt fyri at eggja kommununum til at reka málskúla?

Fólkaskúli ella málskúli
Útlendingastovan metir, at tað er av týdningi, at undirvísing av børnum í fólkaskúlaaldri gongur fyri seg í fólkaskúlanum, og at tað bert í undantaksføri skal bera til at bjóða børnum í fólkaskúlaaldri undirvísing í einum undirvísingartilboði, sum er ætlað vaksnum. Í slíkum førum eigur tað at vera ein treyt, at undirvísarin hevur útbúgving sum fólkaskúlalærari.

Útlendingastovan metir tað vera umráðandi, at tað er greitt, at fólkaskúlin eigur ábyrgdina av at læra hesi børn føroyskt, og at undirvísingin ikki bara skal fara fram í serligum undirvísingartímum í føroyskum sum annaðmál.

Onnur undirvísing
Útlendingastovan fegnast um, at møguleiki verður fyri at skipa fyri undirvísing í donskum sum annaðmál, tí Útlendingastovan metir, at tørvurin er vaksandi. Við vaksandi tilflytaratali økjast sannlíkindini fyri, at fleiri útlendsk børn og ung ikki hava fullfíggjað fólkaskúlaprógv, og at ung ikki megna ikki at standa fráfaringarroynd í føroyskum og/ella donskum.

Skálatrøð 20 ▪ Postboks 264 ▪ FO-110 Tórshavn ▪ Faroe Islands ▪ Tel +298 35 79 79 ▪ info@utlendingastovan.fo ▪ www.utlendingastovan.fo

ÚTLENDINGASTOVAN
IMMIGRATION OFFICE

Fyri at fáa møguleika at leita sær miðnámsútbúgving ella víðari útbúgving í Føroyum ella í Danmark, hava hesi tørv á at fáa undirvísing í og møguleika at kunna standa prótvøku í føroyskum og donskum, ið gevur teimum atgongd til hesar útbúgvingar.

Vegna Útlendingastovuna

Sólvá G. Dam

Skálatrøð 20 ▪ Postboks 264 ▪ FO-110 Tórshavn ▪ Faroe Islands ▪ Tel +298 35 79 79 ▪ info@utlendingastovan.fo ▪ www.utlendingastovan.fo